Tað, sum B36 longu hevur vitað í eina viku, varð staðfest leygardagin, tá teir fingu gullmerkini handað suðuri á Eiðinum

VB – B36 2-1 (1-0)

B36 fekk gullmerkini

VB steðgaði sigursrøðini hjá B36 leygardagin, tá vágbingar vunnu 2-1 á Eiðinum. Sigurin var uppiborin, tí vágbingar vóru naskari. Eftir dystin fingu teir svørtu og hvítu gullmerki um hálsin, men VB rakk ikki triðja plássinum

FÓTBÓLTUR
orð: Stefan í Skorini
mynd: Álvur Haraldssen

VB vann seinasta dystin í hesi landskappingini móti føroyameistarunum B36. Úrslitið gjørdist 2-1 til heimaliðið, og tað mundi vera á góðari leið, um hugt verður at teimum málmøguleikum, ið liðini høvdu. VB var naskari og hevði fleiri málmøguleikar enn B36.

B36 hevði longu tryggjað sær meistaraheitið undan dystinum, og tí vóru havnarmenn ikki so uppsettir frá byrjan av. Tað var greitt, at vágbingar høvdu meira at spæla fyri og vóru ágrýtnari enn mótstøðuliðið úr Havn. VB skuldi vinna dystin, og B68 skuldi tapa í Klaksvík fyri at fáa bronsuna í hús. Meistararnir í fjor vildu óivað eisini prógvað, at teir kunnu spæla upp við Føroya besta lið.

Robert leggur fyri

Bara sjey minuttir vóru spældir, tá VB legði seg á odda. Birgir Jørgensen lyfti bóltin innum verjuna, og Robert Cieslewicz var kvikur á bóltinum og prikaði framvið Tróndi Vatnhamar í málinum.

B36 hevði ein vánaligan fyrra hálvleik, og vágbingar vóru nógv meira ágangandi fyri steðgin. Teir høvdu fleiri vandamikil álop, og útiliðið hevði ilt við at fóta sær á váta vøllinum í Vági. Strúkur vindur var omaneftir vøllinum, og hetta darvaði spælinum ómetaliga nógv. Spælararnir høvdu ógvuliga ilt við at fáa tamarhald á bóltinum, og tí var einki skipað spæl, men leikararnir royndu mest at sparka bóltin niðan móti málinum hjá mótstøðuliðnum.

VB skapti ikki nógvar opnar málmøguleikar, men fleiri vandamiklar støður vóru at siga frá. Bjarni Johansen var at kalla arbeiðsleysur og hugdi mest at dystinum.

B36 leikararnir eru ikki vanir við hetta slagið av vølli, og tað sást á spælinum.

Tveir fegnir B36'arar. Kjartan Mohr og Baldvin Baldvinsson hyggja at skreytinum, sum komandi árið fer at standa í steypaskápinum

B36 svarar aftur

Eftir steðgin sendi Piotr Krakowski Magna á Lakjuni fram í álopið, tá Klæmint Matras fór út við skaða.

B36 spældi munandi betri eftir steðgin, og tað gav úrslit miðskeiðis í seinna hálvleiki. John Petersen brýtur í gjøgnum verjuna hjá VB, og dómarin metti, at hann varð feldur av einum verjuleikara.

John Petersen snýtti málverjan og sendi brotssparkið mitt í málið til 1-1. B36 hevði nú møguleika at vinna fjúrtanda sigurin á rað í landskappingini og harvið seta met við flest stigum í einum kappingarári. Metið eigur B36 liðið frá 1997.

Hetta eydnaðist tó ikki, tí eftir málið raknaði heimaliðið við aftur. Hetta hevði við sær, at VB aftur fór at leypa á B36 málið. Tróndur Vatnhamar mátti gera fleiri bjaringar fyri at halda vágbingum frá fatinum. Marek gjørdist einaferð leysur við málverjanum, sum var skjótur út at bjarga.

Í seinastu minuttunum fekk VB tó vinnandi málið. Tað skeyt Birgir Jørgensen, tá hann beindi eitt innlegg úr høgru í netið. Birgir var vandamiklasti leikarin hjá VB, og hann var ein støðug hóttan móti Tróndi. Birgir byrjaði árið í 3. deild hjá VB, men hann varð síðani tikin upp á 1. lið. Har hevur hann eisini prógvað, at hann er ein vandamikil áleypari, og hann gjørdist toppskjútti við tólv málum. Hetta er nógv, tá hugsað verður um, at hann ikki hevur spælt eins nógvar dystir og hinir.

Sum heild var VB tað liðið, sum var meira sannførandi gjøgnum dystin, og teir skaptu eisini fleiri málmøguleikar enn B36.

Mistu bronsuna

Við sigrinum á B36 var bronsan at kalla tryggjað, men Hans Fróði Hansen javnaði fyri B68 í seinasta minutti móti KÍ í Klaksvík, og tí endaði VB á fjórða plássi. Hetta var eitt stórt vónbrot fyri vágbingar, sum høvdu sloppið at spælt evropeiskan fótbólt annað árið á rað.

B36 fekk eftir dystin gullmerkini um hálsin, og leikararnir høvdu forgyltar gaggur, hosur og hár fyri at seta dám á henda seinasta dystin í kappingarárinum, sum hevur hilnast so avbera væl hjá havnarfelagnum.

John Petersen, sum hevur verið liðformaður hetta kappingarárið, lyfti steypið, sum sær heldur visaligt út til at vera FM steyp í 1. deild. Við sær høvdu teir eisini Løgmanssteypið, ið teir vunnu á Ólavssøku móti KÍ.

Hetta er fyrstu ferð í søgu felagsins, at B36 vinnur greipuna, og tað er eitt megnar avrik. At byrja við í hesum kappingarárinum vóru tað fá, ið mettu, at B36 fór at gera seg galdandi sum greipuvinnari, men B36 hevur nógvar sera góðar leikarar, sum hava dygdirnar at bera liðið fram til meistaraheitið.

Dysturin í tølum:

VB-B36 2-1 (1-0)
1-0: Robert Cieslewicz 3
1-1: John Petersen (br.) 81
2-1: Birgir Jørgensen 90
Dómari: Oddmar Andreasen (HB)

VB: Bjarni Johansen - Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen - Palli Augustinussen, Gisli Sveinbjørnsson, Krzystof Popczynski, Marek Wierzbicki, Jón Pauli Olsen - Birgir Jørgensen, Robert Cieslewicz
B36: Tróndur Vatnhamar - Arnbjørn Danielsen, Egil Zachariassen, Pól Thorsteinsson - Jens Kristian Hansen, Jan Guttesen, Klæmint Matras, Kenneth Jacobsen - Heðin á Lakjuni, John Petersen, Jákup á Borg

Dreymurin gekk út

Formaðurin í B36 síðan 1987, Kristjan á Neystabø, sigur, at hetta er ein dreymur, sum gongur út, nú B36 fyri fyrstu ferð er meistari og steypavinnari. Hann væntar, at allir leikararnir halda fram í B36 næsta kappingarár

FÓTBÓLTUR
Stefan í Skorini

Formaðurin í B36 er sjálvandi ógvuliga fegin og errin av úrslitinum, sum felagið í ár hevur fingið.

– Hetta er ein dreymur, sum gongur út. Vit vóru ógvuliga nær við í 1991, tá vit vunnu steypakappingina, men vóru ov stuttir í landskappingini.

Hetta er næsta meistaraheitið og næsta steypakappingin, hann hevur verið við til at vunnið sum formaður.

Teir flestu verandi

Kristjan sigur, at leiðslan í felagnum nú fer at gera støðuna upp í teimum komandi vikunum og leggja eina ætlan fyri, hvussu felagið skal brynja seg til komandi kappingarár. Tá skal koma uppá pláss, hvør verður við komandi ár, hvør skal taka sær av liðnum.

– Eg vænti, at vit hava næstan allar leikararnar frá í ár tøkar aftur komadi ár. Vit í leiðsluni eru sjálvandi væl nøgd við venjaran, men enn er einki komið uppá pláss hesum viðvíkjandi, sigur Kristjan.

Í B36-húsinum hava tey dansað til tann ljósa morgun tvey vikuskiftið á rað, og um nakrar vikur verður aftur hátíðarhald. Felagið hevur í ár 65 ár á baki, og formaðurin kundi ikki ynskt sær eina betri føðingardagsgávu enn eina gullgreipu.

Annars sigur formaðurin, at hann væntaði frá byrjan av, at B36 hevði møguleikan at gera seg galdandi í ár, men hann væntaði, at fleiri lið fóru at kappast um FM enn bara B36 og GÍ. Tað gjørdist greitt longu í summarsteðginum, at GÍ og B36 fóru at avgera tað sínámillum.

Kristjan á Neystabø er fegin og errin um greipuna, sum felagið í ár hevur vunnið

– Okkara lið hevur ongatíð lagt áðrarnar inn, fyrr enn dysturin er avblástur, og tað er eyðkenni fyri eitt meistaralið. Okkara áleyparar hava eisini skotið nógv mál og hava verið neyvir og ágrýtnir, sigur Kristjan á Neystabø.

Landsliðið fer mikudagin til Slovenia, og tá eru seks leikarar úr B36 við, og Pól Thorsteinsson hevur givið avboð. Kristjan sigur, at hetta ber boð um, at B36 hevur tað besta liðið í ár, og felagið er errið av at hava so nógvar umboðandi B36 á landsliðnum.

Hóast veðrið pent sagt ikki var nakað serligt, so køvdi hetta á ongan hátt fagnaðarløtuna, tá Smyril stevndi inn móti molanum við syngjandi leikarum standandi uppi á brúnni

FSF-bossurin kundi fyri seinastu ferð í formansskeiði sínum heingja gullmerkini um hálsin á føryameistarunum